# Greenpeace í hernað móti nýggjum oljuboringum



Greenpeace ger alt fyri at steðga nýggjum oljuboringum, eitt nú norðan fyri Skotland. Men eygleiðarar halda ikki, at Greenpeace fer at fáa nakað burtur úr øllum stríðnum Mynd: REUTER

**Eygleiðarar eru samdir um, at umhvørvisfelagsskapurin Greenpeace ikki fer at fáa nakað serligt burtur úr nýggjastu kampanjuni móti BP norðan fyri Skotland.**

EMIL L. JACOBSEN

(REUTER) Tað er lítið sannlíkt, at Greenpeace fer at fáa ein sigur á hædd við tann um Brent Spar burtur úr núverandi kampanjuni hjá umhvørvisfelagsskapinum móti ætlanunum hjá British Petroleum (BP) at menna oljuøki í Atlantshavinum.

Seinasta sunnudag fóru tveir aktivistar úr Greenpeace umborð á ein mobilan BP-boripall, sum var á veg til nýggja oljuøkið Foinaven.

Týsdagin høvdu teir báðir fest ein »yvirlivilsiskapsil« á Stena Dee-boripallin, so teir eru nú fyrireikaðir upp á at skula vera leingi á pallinum, segði ein talskvinna hjá Greenpeace.

Mótmælið er partur av eini langari kampanju móti, at nýggj oljuøki verða ment í Atlantshavinum beint norðan fyri Skotland.

Men eygleiðarar siga, at Greenpeace-kampanjan ikki hevur nakað beinleiðis fokus, og av tí at BP hevur sett eina rúgvu av pengum í ætlanina, fer oljufelagið undir ongum umstøðum at bakka.

– Ætlanin við kampanjuni er at fáa alla oljuframleiðslu at halda uppat – tað er torført at síggja, hvussu eitt olju- og gassfelag kann taka undir við tí. Tað frægasta, BP kann gera, er at vera so umhvørvisvinarligt sum gjørligt, sigur Gordon Gray, sum arbeiðir hjá íløgubankanum Salomon Brothers í London, og sum er serfrøðingur í oljuídnaði.

Tiltakið hjá Greenpeace við at fara upp á Stena Dee- boripallin hevur ikki fingið so nógva umrøðu í bretsku fjølmiðlunum, sum umhvørvisfelagsskapurin ivaleyst hevði ætlað sær.

Tá Greenpeace í 1995 gjørdi tað sama við oljupallin Brent Spar hjá Shell, fekk tað nógva umrøðu í fjølmiðlunum, og tað hevði eisini sína ávirkan á almenningin.

Shell ætlaði at søkka útbrúkta boripallin í havið, men tað gekk Greenpeace ikki við til.

Umrøðan í fjølmiðlunum gjørdi, at motoristar, serliga í Týsklandi, boykottaðu Shell, og endin varð, at Shell noyddist at sleppa sær av við boripallin á annan hátt.

– Brent Spar var eitt sera viðbrekið mál, men hetta er nakað annað. Um tú vilt boykotta BP, tí teir framleiða olju, noyðist tú at boykotta øll oljufeløgini, sigur Gordon Gray.

## Meiri peningur við hesaferð

Tað er eisini stórur munur á, hvussu nógvur peningur er uppi í hesuferð.

Tá Shell noyddist at broyta ætlanirnar við Brent Spar, hevði enskhollendska oljufelagið brúkt eini 10 milliónir pund upp á ætlanina.

Útreiðslurnar hjá BP í Foinaven eru 70 ferðir so stórar – nærum 700 milliónir pund.

– Oljufeløg leggja ikki so nógv í umhvørvisfelagsskapir, sum aðrar vinnur gera, tí íløgurnar eru so stórar, sigur John Bray, sum er ráðgevi hjá Control Risks Group, sum er ein heilagrunnur av serfrøðingum.

– BP hugsar sjálvandi um sítt egna umdømi og image, men eg dugi ikki at síggja, hvussu oljufelagið kann gera kompromis á hesum øki, sigur hann.

Greenpeace boðaði týsdagin frá, at BP hevði fingið eitt skriv frá teimum, har heitt verður á oljufelagið um at steðga arbeiðnum við Foinaven.

Greenpeace er ímóti øllum nýggjum oljuboringum við tí grundgeving, at tað er neyðugt at hava brennievni í undirgrundini, um jørðin ikki skal verða ovurupphitað.

Foinaven, sum skal geva BP 120.000 tunnur um dagin, skal vera tað fyrsta av økjunum í Atlantshavinum, sum skal framleiða, men Greenpeace sigur, at kampanjan ikki bert er vend móti einum einstøkum oljufelag.

– Sjálvandi eru vit ikki bert eftir BP í hesum málinum. Vit hava eisini fleiri onnur oljufeløg í huga, og vit halda eisini, at stjórnin noyðist at ganga á odda fyri at steðga hesum, sigur ein talskvinna hjá Greenpeace.

Men av tí, at eingin veruligur syndabukkur er, fær Greenpeace helst einki burtur úr øllum stríðnum.

– Tað er ikki so lætt, tí hetta snýr seg ikki bert um BP, og sum heild er BP eisini kent fyri at hugsa nógv um umhvørvið, sigur Gordon Gray frá Salomon Brothers.

# Ellivu fjakkarar allarhelst deyðir í Arizona

**Hóast tað framvegis verður leitað, bendir alt á, at ellivu fjakkarar eru deyðir í eini gjógv í norðara parti av Arizona.**

EMIL L. JACOBSEN

(REUTER) Ein fjakkari var funnin deyður mikudagin, og ótti er fyri, at tíggju aðrir hava latið lív í eini flóðaldu í eini gjógv har norðuri í amerikanska statinum Arizona.

Meðan leitingararbeiðið helt fram, søgdu embætisfólk, at møguleikin fyri at finna fleiri fólk á lívi var lítil.

Fjakkararnir, har av teir flestu vóru úr Europa, vórðu fangaðir, tá vatnið skolaði oman gjøgnum ta vanliga turru gjónna Antelope Canyon týsdagin.

– Tað er altíð ein møguleiki fyri, at onkur er sloppin upp á onkustaðni og er á lívi, men tað er ikki serliga sannlíkt, segði Mike Rice av sheriffskrivstovuni í Coconino County.

– Beint nú halda vit ikki, at nakar er sloppin frá vanlukkuni við lívinum.

Av teimum ellivu fjakkarunum vóru sjey úr Fraklandi, tveir úr USA, ein úr Bretlandi og ein úr Svøríki.

Rice segði, at higartil vistu teir bert um ein, sum slapp við lívinum, nevniliga ferðaleiðarin Poncho Quintana, sum arbeiddi fyri TrekAmerica, sum hevur heimstað í Los Angeles.

Fimm av fjakkarunum vóru á eini útferð, sum TrekAmerica skipaði fyri.

Starvsfólkaleiðarin hjá TrekAmerica, Jack Aakhus, segði, at hann hevði eitt stutt prát við Quintana, stutt eftir at hesin varð bjargaður týsdagin.

– Hann segði: »Jack, eg veit ikki, hvat hendi. Vatnið rakti meg, og tað helt bara fram við at koma«, greiddi Aakhus frá.

– Hatta er eitt vælumtókt stað hjá myndatakarum. Navajo-indianararnir reka tað. Tað er ein sera djúp gjógv, og tað er bert umleið 1,5 metur millum veggirnar. Tað er sera vakurt, men ikki serliga stuttligt at vera har, tá vatnið kemur.

# Løgreglan stendur enn á berum í vakurleikamorðinum

**Tað eru skjótt átta mánaðir, síðani seks ára gamla vakurleikadrotningin JonBenet Ramsey varð myrd í sínum egna heimi 2. jólakvøld 1996. Men løgreglan stendur enn á berum.**

EMIL L. JACOBSEN

(REUTER) Tann myrda seks ára gamla vakurleikadrotningin JonBenet Ramsey úr amerikanski býnum Boulder í Colorado hevði rundan um hálsin ein hvítan strong við einum pinni, har orðið »Korea« stóð prentað á við gullbókstavum.

Hetta kemur fram í líkskurðsfrágreiðingini, sum varð almannakunngjørd mikudagin.

Men frágreiðingin dugdi ikki at svara upp á ein av týdningarmiklastu spurningunum í morðgátuni – nær hon doyði.

Frágreiðingin segði heldur einki um, um barnið hevði verið fyri kynsligum yvirgangi.

Træpinnurin, sum var festur í strongin um hálsin á henni, var »óregluliga brotin í báðum endum, og fleiri litir av máling vóru á honum«, stendur í frágreiðingini.

Men eitt annað orð, sum stóð á træpinninum, var ólesandi.

Hennara langa, ljósa hár var fløkt upp í strongin, sum lá um hálsin hjá henni, eins væl og strongin, sum var vundin rundan um pinnin.

Líkið av gentuni varð funnið av pápa hennara, John Ramsey, í kjallaranum í teirra egna heimi seinnapartin tann 26. desember og varð síðani borið upp í stovuna.

## Krav um loysigjald

Líkskoðarin kom á staðið klokkan 20.00 2. jólakvøld.

Hann segði, at líkið lá á rygginum við ørmunum upp um høvdið.

Tey høvdu lagt eitt teppi og eina blusu yvir hana, tá líkskoðarin kom.

Somu náttina fann mamman Patsy ein lepa við kravi um 118.000 dollarar í loysigjaldi á trappuni aftan fyri húsini.

Líkskurðurin staðfesti, at gentan varð kvald.

Skallabeinið hevði eisini fingið skaða.

Nú hava kanningarnar staðið á í átta mánaðir, men enn er eingin handtikin, og løgreglan hevur ikki illgruna til nakran.

Ramsey-familjan hevur funnist at løgregluni fyri at hugsa ov nógv um tey, og tey hava tí sett síni egnu kanningarfólk í starv.

Embætisfólk í Boulder vildu halda líkskurðsfrágreiðingina loyniliga, tí í henni eru upplýsingar, sum bert drápsmaðurin kann vita nakað um.

Men fjølmiðlarnir fóru í rættin við málinum og fingu viðhald, so frágreiðingin varð gjørd almenn.


Seks ára gamla vakurleikadrotningin JonBenet Ramsey varð funnin deyð 2. jóladag í fjør í kjallaranum í sínum egna heimi. Enn hevur løgreglan ikki handtikið nakran, og eingin er undir illgruna Mynd: REUTER